J.nr.: 7906K001

# Viðtøkur fyri bygdasavnið "Gamli skúli"

§ 1.

Fornminnisfelagið í Leirvík er stovnari av bygdasavninum "Gamli skúli"

§ 2.

Endamál bygdasavnsins er í Leirvík:
1. at eiga, seta í stand og reka gamla skúlabygningin frá 1881.
2. at savna myndir, frásagnir, og annað siðsøguligt tilfar við atliti til, at hetta verður varðveitt.
3. at skráseta staðarnøvn og jarðføst fornminni.
4. at seta upp siðsøguligar framsýningar.
5. at skipa fyri, at tilfarið verður alment atgeingiligt.

§ 3.

Bygdasavnið verður stýrt av 5 limum, sum verða valdir av Fornminnisfelagnum í Leirvík á fyrstkomandi nevndarfundi eftir aðalfund.

Nevndin skipar seg við formanni, næstformanni, og kassameistara, sum ikki kann vera sami persónur. Samtyktir nevndarinnar verða gjørdar við vanligum meiriluta. Formaður felagsins skrivar í gerðabók yvirlit yvir nevndarsamtyktir og felagsarbeiði.

Endamál nevndarinnar er at inna tey í § 2 nevndu punkt

Nevndin stendur aðalfundi Fornminnisfelagsins í Leirvík til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Roknskaparárið er álmannakkaárið.

Roknskapurin verður grannskoðaður av grannskoðarum Fornminnisfelagsins í Leirvík.

Nevndin kunnar skrivliga Fornminnisfelagið í Leirvík um virki felagsins.

§ 4.

Gevst bygdasavnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

Soleiðis samtykt á eykaaðalfundi hjá Fornminnisfelagnum í Leirvík tann 08.12.2003.